

*Stór frøi á reyðu fuglfirðingunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Jákup Mikkelsen:

# Absolut ikki innanfyri

Tað sigur Jákup Mikkelsen um støðuna seint í seinna hálvleiki, tá fleiri víkingaleikarar vildu vera við, at bólturin var innan fyri eftir deyðbóltsstøðu. Støðan hendi stutt eftir at ÍF hevði lagt seg á odda 2-0 og 3-2 samanlagt. Tí vóru menn heitir um tað mundið.

– Eg haldi ikki eingang, at bólturin var á málstrikuni. Eg datt inn móti málinum, men kastaði bóltin frá mær, áðrenn hann kom ov nær málinum. Bólturin var absolut ikki inni, sigur Jákup Mikkelsen, tá Sosialurin tosaði við hann stutt eftir dystin.

Fyrrverandi landsliðsmál-maðurin hevði næstan mist vónina um at koma í finaluna.

– Tá eg spurdi dómaran um tíðina og hann segði at tað vóru fimm minuttir eftir, hevði eg ringt við at trúgva upp á tað. Vit spældu okkara spæl og tað eydnaðist tíbetur fáa seinna málið, sigur Jákup Mikkelsen

Fyri klaksvíkingin í ÍF málinum er steypafinalan nakað heilt serligt í ár.

– Fyri meg er tað sjálvandi serliga stuttligt at koma í steypafinaluna í ár, tí hon verður leikt í Klaksvík. Tað verður stuttligt, sigur Jákup, meðan viðleikararnir, ein fyri og annar eftir, koma út úr skiftirúminum við einum stórum smíli og glimt í eyganum.

At Jákup Mikkelsen hevur spælt leingi á hægsta støði kemur til sjóndar, tá Sosialurin spyr hann um fyrrverandi steypafinalur hjá honum. Tá fer Jákup at ivast eitt sindur, men tað gongur væl at minnast tær, hann hevur vunnið.

– Also eg havi vunnið tvær steypakappingar við KÍ og eina við B36, men eg minnist ikki rættiliga, hvussu nógvar eg tapti. Tað hevði verið stuttligt at vunnið steypakappingina við ÍF eisini, tí so havi eg vunnið hana við trimum liðum, sigur Jákup Mikkelsen at enda.

## Súni Olsen:

# Eg má rósa ÍF

Tað sigur Súni Olsen, sum var liðskipari hjá Víkingi í gjár.

– Eg má rósa ÍF, tí teir vóru klárt betra liðið í dag. Teir vildu meir enn vit og teir vunnu uppiborið. Einki riggaði hjá okkum í gjár. Støðan var leingi 1-0, men so fáa teir eitt bíligt frískpark, men tað er so tað. Sæð yvir allan dystin, so høvdu teir uppiborið at vinna 3-0 og meira er ikki at siga um tað, sigur Súni Olsen.

Tað sá leingi út til, at Víkingur fór at koma í finaluna á øðrum sinni í tvey ár, men mistu á stokkinum.

– Tann útstrálingin og vill-skapurin, ið vit eru kendir fyri, var ikki til staðar í gjár. Vit vóru alla tíðina ein metur aftan fyri teir, vit vinna ikki nærdystirnar og teir eru eisini fyrstir á teir leysu bóltarnar. Teir vóru betri enn vit á øllum plássum, sigur ein vónsvikin Súni Olsen eftir dystin.

Tað er ilt at seta fingurin á, akkurát hvat gekk galið hjá Víkingi, men eitt er vist og tað er at Víkingur endurvinnur ikki Løgmanssteypið.

– Eg tími so illa at tosa um hvat gekk galið hjá okkum. Alt rós til ÍF, tá eitt lið kemur her og vinnur 3-0, so er tað uppiborið, sigur Súni Olsen at enda.



*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Víkingur – ÍF (0-1) 0-3

**0-1: Dánjal á Lakjuni (25)**
**0-2: Jan Ellingsgaard (91)**
**0-3: Øssur Dalbúð (95)**
Dómari: Lars Muller

**ÍF:**
Jákup Mikkelsen, Áki Petersen, Uni R. Petersen, Høgni Zachariassen(Liðsk), Jan Ellingsgard – Dánjal á Lakjuni, Frank Poulsen(Fritleif í Lambanum 74.min), Alexander Jovevic(Karl Løkin 70.min) Andy Olsen – Nenad Saric og Øssur Dalbúð

***Gul kort:*** Høgni Zachariassen, Nenad Saric

**Víkingur:**
Geza Turi – Sverri Jacobsen, Atli Gregersen, Áslakur Petersen, Bárður Hansen – Finnur Justinussen, Súni Olsen(Liðsk), Nenad Stankovic, Hans Jørgen Djurhuus(Kaj Leo í Bartalstovu 42.min) – Sólvi Vatnhamar og Sam Jacobsen(Martin Olsen 85.min)

***Gult kort:*** Sverri Jacobsen, Atli Gregersen

# Bygdirnar á størsta pallin á Summar-festivalinum

**LØGMANSSTEYPIÐ Í bara fimm av teimum 21 finalunum, sum higartil eru spældar um løgmanssteypið, hevur í minsta lagið annað av luttakandi liðunum ikki verið úr høvuðsstaðnum**

Tróndur Arge

Í gjárkvøldið gjørdist tað greitt, at tað vera ÍF og EB/Streymur, sum í steypafinaluni skulu stríðast um at vinna løgmanssteypið. Harvið varð tað í 2. hálvfinaluni vent upp og niður upp á støðuna soleiðis, sum hon var eftir fyrru hálvfinalurnar.

Víkingur vann 2-1 á ÍF í Fuglafirði, og B36 vann 2-1 á EB/Streymi í Gundadali. Í gjárkvøldið eydnaðist tað hvørki Víkingi ella B36 at skjóta mál. ÍF vann 3-0 í Sarpugerði. Tað er størsti sigur hjá fuglfirðingum í Sarpugerði í mong ár, og EB/Streymur vann 2-0 á B36 við Margáir.

Finalan verður spæld fríggjakvøldið 6. august í Klaksvík, meðan Summarfestivalurin verður. Finalan verður altso spæld á bygd, og tað verða tvey bygdalið, sum fara at stríðast um løgmanssteypið og atgongumerkið til at taka lut í europeisku kappingini um eitt ár.

ÍF hevur bara eina ferð áður verið í steypafinaluni. Tað var ólavsøkudag í 2005, tá ið ÍF á Tórsvølli tapti 4-1 ímóti GÍ. EB/Streymur hevur verið tríggjar ferðir áður í finaluni – trý tey undanfarnu árini. Í 2007 vann EB/Streymur 4-3 á HB á ovara vølli í Gundadali, í 2008 vann EB/Streymur 3-2 á B36 á ovara vølli í Gundadali, og í fjør tapti EB/Streymur 3-2 ímóti Víkingi á ovara vølli í Gundadali.

Tað hevur verið kappast um løgmanssteypið síðani 1989. Tað vil siga, at 22. finalan stendur fyri framman. HB hevur vunnið fimm finalur, og B36 hevur vunnið fýra finalur. HB hevur tapt seks finalur, og B36 hevur tapt tvær finalur. Allar 21 finalurnar hava verið spældar í Gundadali, og Havnin hevur sekstan ferðir átt eitt finalulið.

Eina ferð hevur finalan um løgmanssteypið staðið millum B36 og HB. Tað var í 1991, tá ið B36 vann 1-0, og Bergur Magnussen skoraði einsamalla málið. HB hevur ikki verið í steypafinaluni síðani 2004, og B36 hevur ikki verið í steypafinaluni síðani í 2006.

Fimm ferðir áður hava finalurnar verið millum tvey bygdarfeløg: KÍ-GÍ 6-1 í 1990, KÍ-B71 2-1 í 1994, GÍ-VB 6-0 í 1997, GÍ-ÍF 4-1 í 2005 og Víkingur-EB/Streymur 3-2 í 2009.

Nú er tað greitt, at finalan í ár verður millum tvey feløg av bygd. Og finalan verður meiri bygdaslig, enn allar tær undanfarnu hava verið. Umframt at luttakararnir vera av bygd, so verður finalan hesa ferð spæld á bygd.

Kanska verður áhoyraratalið størri til onkra konsertina á Summarfestivalinum, enn áskoðaratalið verður til steypafinaluna. Men tað er eingin ivi um, at pallurin verður størri, enn hann verður á nakrari konsertini, tá ið ÍF og EB/Streymur fara at spæla finalu um løgmanssteypið fríggjakvøldið 6. august – í Klaksvík.

*trondur@sosialurin.fo*